**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI VINDMYLLUR Í HOYVÍKSHAGA**
**SB_Hoyvík_Vindmyllur_2020_1_2021**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, partur av matr. nr. 139a, Hoyvík og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

Stk. 2. Økið liggur í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa uppsetan av vindmyllum, tænastuøki, tilkoyring og vegir á økinum, samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Sambært kap. IV §26 í almennu byggisamtyktini, er 4. grundumráði í høvuðsheitum lagt út til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Tó er eisini loyvt, við eini serstakari byggisamtykt, at gera byggingar, sum eru neyðugar fyri alment gagnligar veitingar og staðseting av aðrari bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki.

Stk. 3. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu 6 vindmyllur setast upp við hartilhoyrandi tænastuøki og koyrivegi sambært kortskjali 2.

Stk. 2. Bert eitt slag av vindmyllum skal setast upp á økinum.

Stk. 3. Ampar av vindmyllunum skulu avmarkast mest møguligt.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Vindmyllur av slagnum ~~Enercon E82~~Vestas V-117, ella líknandi, kunnu setast upp sambært kortskjali 2.

Stk. 2. Mest loyvda hædd er 92~~79~~ m upp til tornið.

Stk. 3. Mest loyvda breidd á veingjum er 11782 m.

## §5. VEGIR

Stk. 1. Koyrivegir á økinum skulu leggjast í minst 4 m breidd samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Um annað virksemi verður í økinum ella vindmylluøkið verður víðkað, skal loyvi gevast til nýtslu av vegunum til slíkt virksemi, eisini hóast talan er um aðrar eigarar. Ásetingarnar í Kap. V, §6, stk. 2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, um avtøku ella steingjan av vegunum eru galdandi fyri vegirnar, ið eru fevndir at hesi serstøku byggisamtyktini.

Stk. 3. Tænastuøki er til hvørja myllu.

Stk. 4. Samlingarøki til hvørja myllu skal takast burtur, tá ið myllurnar eru settar upp.

## §6. UMHVØRVISKRØV

Stk. 1. Byggiloyvið er treytað av góðkenning av umhvørvisárinskanning.

Stk. 2. Byggiloyvið er treytað av umhvørvisgoðkenning.

Stk. 3. Trygging skal veitast ímóti dálking í sambandi við bygging og í sambandi við dagliga virksemið.

Stk. 4. Vindmyllurnar standa í uppsamlingarøkinum til drekkivatn við Villingardal og Havnardal. ~~Tryggjast skal, at drekkivatn goymslurnar ikki verða dálkaðar~~Neyðug atlit skulu takast til at drekkivatnið ikki verður dálkað, bæði undir uppsetan av myllunum og tá ið myllurnar eru tiknar í nýtslu.

Stk. 5. Kommunan kemur at seta krav um tilbúgvingarætlan í smb. við vindmyllulundina. Tilbúgvingarætlanin skal vera í samsvar við ta tøkni, sum skal brúkast.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.



**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga | | | | |
| **Undirheiti** | 1 | | | | |
| **Mát** | 1:20000 | | | | |
| **Dagur** | 28.09.2020 | **Journal** | 20/00719 | **Tekna** | RVH |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga | | | | |
| **Undirheiti** | 2 | | | | |
| **Mát** | 1:10000 | | | | |
| **Dagur** | 28.09.2020 | **Journal** | 20/00719 | **Tekna** | RVH |